

# Mafian søkt eiturskip

Mafian í Italia hevur søkt eitt skip, sum var fermt við geislavirknjum burturkasti. Italska sjóverjan hevur funnið vrakið í Miðjarðarhavinum einar 15 fjórðingar úr landi, og løgreglan kannar tað nú. Myndir av vrakinum vísa, at skipið er heilt, og rundan um tað liggja fleiri tunnur, sum hava frámerki, ið sigur, at innihaldið í teimum er eitrandi. Italskir fjølmiðlar siga, at vísir tað seg, at innihaldið í tunnunum er geislavirkið, fara myndugleikarnir at kanna umleið 30 onnur skip, sum mafian eftir øllum at døma hevur søkt nærhendis italsku og griksku strondini.

# Jacob Vestergaard kannast fyri lógarbrot



*Jacob Vestergaard er komin í politiskt ódnarveður, bæði í andstøðu og í samgongu, eftir at hann hevur steðgað útgjaldi av minstuløn og aðrari inntøkutrygd til fiskimenn og útróðrarmenn tí at játtanin á fíggjarlógini er uppi*

**Hetta skal ikki spæla væl av, hóttir Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður**

INNTØKUTRYGD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Breyt Jacob Vestergaard lógina, tá ið hann herfyri steðgaði øllum útgjaldi av minstuløn og aðrari inntøkutrygd til fiskimenn og útróðrarmenn?

Tað er ein spurningur, sum Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, nú vil hava kannaðan út í æsir.

Hann vil eisini kanna um Jacob Vestergaaard hevur víst nøktandi politiskt handalag ella um hann hevur rætt og slætt hevur sitið hendur í favn og onki gjørt við tí úrsliti, at fiskimenn og útróðrarmenn nú ikki fáa ta inntøkutrygd, sum teir hava lógarfest krav upp á at fáa.

Tí er hann nú í ferð við at skriva landsstýrismálanevndini eitt brævt, har hann heitir á nevndina um at siga sína hugsan um málið.

## Ongir pengar eftir

Tað var fyri einum mánaði síðani, at Jacob Vestergaard steðgaði øllum útgjaldi av minstuløn og aðrari inntøkutrygd til fiskimenn og útróðrarmenn.

Orsøkin er, at játtanin á fíggjarlógini var uppi.

Hetta fekk hann dygg høgg fyri í Løgtinginum í gjár, har politikarar úr øllum ættum funnust at mátanum, landsstýrismaðurin hevur handfarið málið upp á.

Eisini Anfinn Kallsberg og aðrir partamenn hjá Jacob Vestergaard í Fólkaflokkinum, mettu, at hann átti ikki at havt steðgað útgjaldinum, hóast játtanin var uppi.

Men tað varð eisini upplýst, at avgerðin um at steðga útgjaldinum er grundað á løgfrøðiligt tilmæli, sum sigur, at peningur kann ikki gjaldast út, sum ikki er játtaður og hetta hevur landsstýrismaðurin hildið seg til.

Tí kundi væntast, at hann fór at verða frákoyrdur, brúkti hann pening, sum ikki var játtaður.

Men tinglimir úr øllum flokkum vístu á, at lógartryggjaða kravið frá fiskiog útróðrarmonnum eigur at verða tikið fram um.

Víst var til málið um Signar á Brúnni, sum var koyrdur frá sum landsstýrismaður, við vælsignilsi frá sínum egnu partafólkum í Tjóðveldinum, tí at hann hevði goldið sjónvarpsfólkum løn, hóast játtanin var uppi.

Seinni kom ein kanning til ta niðurstøðu, at hann hevði borið seg rætt at.

Í løgtinginum varð eisini mælt til, at allir flokkar skuldu geva Jacob Vestergaard grønt ljós at gjalda út, uttan at tað skuldi fáa politiskar avleiðingar, tí so hevði hann í øllum sín rygg frían.

Men tað hendi so ikki – ikki formliga í hvussu so er.

## Ikki spæla væl av

Tórbjørn Jacobsen var serliga fortørnaður um støðuna, sum hevur tikið seg upp og hann hótti beinleiðis við, at hetta skuldi ikki spæla væl av, sum hann orðaði seg.

Eitt er, at játtanin á fíggjarlógini til endamálið er uppi.

Eitt annað, sum fleiri tinglimir førdu fram, var, at Jacob Vestergaard hevur vitað tað líka síðani tíðliga í vár, at peningurin fór ikki at strekkja til.

Og fleiri tinglimir hildu, at tað sostatt var prógv um álvarsligt drál.

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum førdi fram, at ætlanin var at umleggja inntøkutrygdina fyri at gera hana bíligari, men tað fekst ikki undirtøka fyri tí í samgonguni.

Tí var tað ikki eydnast at fáa umbøn um eykajáttan til endamálið á eykajáttanarlógini, sum varð løgd fram í vár.

Og av tí sama hevur landsstýrismaðurin ikki biðið um eykajáttan til endmálið fyrrenn nú og hann heitti á fíggjarnevndina um at avgreiða málið skjótt.

Men tinglimir úr samgongu og andstøðu hildu, at hetta var ikki annað enn undanførsla.

Eitt nú førdi Bjørn Kalsø fram, at Jacob Vestergaard hevði beinanvegin fingið at vita, at hann fekk ikki undirtøku fyri ætlaðu sparingunum og tí kundi tað ikki brúkast sum undanførsla.

Og Tórbjørn Jacobsen sigur, at manglar peningur í, kann landsstýrismaðurin biðja um teir sjálvur og tí var óneyðugt at koma í hesa støðuna, at steðga útgjaldinum av teirri orsøk, at játtanin er uppi.

Tí vil hann eisini hava landsstýrismálanevndina at siga sína meining um hon heldur, at politiska handfaringin hjá landsstýrismanninum er nøktandi.

# Jacob Vestergaard má betala ella legga frá sær

**Líka mikið hvat Jacob Vestergaard ger, sleppur hann ikki undan at bróta lógina**

INNTØKUTRYGD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Líka mikið, hvat Jacob Vestergaard ger, sleppur hann ikki undan at bróta lógina.

Tað staðfestir Sonja Jógvansdóttir í Samtaki, sum er samskipan ímillum Føroya Fiskimannafelag, Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag.

Men hon staðfestir samstundis, at syrgir hann ikki fyri, at fiskimenn og útróðrarmenn í stundini fáa minstulønina, teir hava rætt til, skal hann leggja frá sær.

Sonja Jógvansdóttir sigur, at talið á sjófólki, ið manglar at fáa útgoldið minstuløn veksur í stórum.

- Men sum tað hevur sæð út, ætlar landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum ikki at halda lógina um inntøkutrygd.

## Brýtur lógina

Samtak hevur fingið eina løgfrøðiliga meting av støðuni og Sonja Jógvansdóttir sigur, at niðurstøðan er púra greið.

Og hon er, at líka mikið, hvat Jacob Vestergaard ger, sleppur hann ikki undan at bróta lógina.

Einasta valið hann hevur, er, hvørja lóg, hann vil bróta, um hann vil bróta lógina, sum gevur fiskimonnum rætt til minstaforvinning, ella lógina sum noktar honum at hava eina útreiðslu, sum Løgtingið ikki hevur játtað.

- Løgfrøðiliga er ongin munur á lógarbrotinum, tí bæði eru líka álvarsomm, sigur Sonja Jógvansdóttir

Hon sigur, at einasti munurin er, hvussu hart lógarbrotini raka.

- Vit undrast á, hví landsstýrismaðurin brýtur lógina um inntøkutrygd, tá ið hugsað verður um, hvussu stórar fíggjarligar avleiðingar hetta hevur fyri nógvar familjur.

Tá ið málið var til umrøðu í Løgtinginum, væntaðu tinglimir, at tað verður minst ein mánaði til málið er avgreitt.

- Hví landsstýrismaðurin hevur drála í hesum máli er óskilligt, sigur Sonja Jógvansdóttir.

Hon sigur, at hann kundi fingið peningin til vega við einum fíggjarnevndarskjali sama dag, sum hann var uppi.

- Hann kundi eisini fingið peningin til vega fyrr í árinum, tí tað hevur leingi verið greitt, at játtanin fór ikki at halda.

Sonja Jógvansdóttir mælir sostatt landsstýrismanninum til at rinda peningin í stundini til tey sjófólk, sum eiga pening til góðar.

- Ella noyðist hann at leggja frá sær, tí tað eru óivað nógv góð fólk, ið kunna taka við eftir hann og sum høvdu raðfest øðrvísi, leggur hon afturat.